## Grønland kann samráðast

Síðani grønlendska sjálvstýrislógin kom í gildi tann 21. juni, hevur grønlendska heimastýrið hevur heimild til at samráðast um altjóða sáttmálar á málsøkjum, sum viðvíkja landinum. Tað stendur at lesa í einari felags frágreiðing frá fundinum, sum landsstýrismaðurin Anthon Frederiksen hevur havt við danska umhvørvismálaráðharranm, Troels Lund Poulsen. Í frágreiðingini leggja teir dent á, at Grønland og Danmark hava eitt tætt samstarv um at verja umhvørvi og náttúru. Tað er eisini galdandi í spurningum av altjóða slagi.



## Eftirskúlar stóran áhuga

Einki bendir á, at fíggjarkreppan hevur ávirkað eftirspurningin eftir at sleppa á eftirskúla í Danmark. DR-kringvarpið sigur, at tær seinastu vikurnar eru 4.800 ungdómar farnir í eftirskúla ymsastaðni í Vestur- og Miðjyllandi. Tað eru 200 fleiri enn seinasta skúlaár, og longu nú eru tveir triðingar av plássunum á eftirskúlunum har næsta skúlaár bíløgd. Ein kanning hjá kringvarpinum vísir, at ungdómar hava serliga áhuga fyri teimum eftirskúlunum, sum hava lærigreinar sum sjónleik, tónleik og ítrótt á tímatalvuni. Tær seinastu vikurnar eru fleiri føroyskir ungdómar farnir á eftirskúla í Danmark.

# NAB heldur fram sum higartil

**Allir teir aktivitetir, sum Norðuratlantsbólkurin hevur sett í verk, halda ótarnaðir fram, sjálvt um Lars Emil Johansen nú er farin úr bólkinum, sigur Høgni Hoydal**

FÓLKATING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*- Norðuratlantsbólkurin heldur ótarnaður fram hóast Lars Emil Johansen hevur tikið serg úr samstarvinum, sigur Høgni Hoydal*

*Mynd: Beinta Haraldsen*

Tað fær onga ávirkan á Norðuratlantsbólkin sum so, at Lars Emil Johansen nú hevur valt at taka seg úr bólkinum.

- Politisku viðurskiftini í Grønlandi eru so nógv broytt eftir valið, og Siumut og IA liggja nú í hvør sínari legu, og hava ilt við at samstarva, sigur Høgni Hoydal.

Hann viðgongur, at tað sjálvandi kann síggja eitt sindur løgi út, at bert tveir fólkatingslimir eru í einum bólki, men vísir á, at talan langt frá er um eitt eindømi á Fólkatingi.

- Tað kann eisini vísa seg at gerast ein fyrimunur, at vit nú bert eru tveir flokkar í bólkinum í staðin fyri tríggir. IA er jú systirflokkur hjá okkum, og vit hava mest sum eins floksskráir, so vit hava somu áhugamál, sigur Høgni Hoydal.

Bólkurin minkar sjalvandi í vavi, og arbeiðsorkan minkar nakað, men føroyski fólkatingslimurin sigur, at limirnir í Norðuratlantsbólkinum alla tíðina hava havt síni egnu starvsfólk.

- Eg havi ein fastan skrivara, og í løtuni hjálpa tvey lesandi til nakrar tímar um vikuna, og tað er tað sama hjá Juliane Henningsen, sigur Høgni Hoydal.

Grønlendski fólkatingslimurin hjá IA er júst vald til næstforkvinnu í flokkinum.

### Heldur fram

Upprunaliga fekk Norðuratlantsbólkurin undantak frá formansskapinum, og tað undantakið heldur fram, sjálvt um bólkurin nú er minkaður við einum limi.

- Vit halda fram við ætlaðu kanningunum og tiltøkunum sum framman undan, og politiska inihaldið í bólkinum er framvegis tað sama. Fyri framman liggur ein kanning av búskaparligu viðurskiftunum millum Danmark, Føroyar og Grønland, og hvat tað kostar, at vit ikki hava okkara egna uttanríkispolitikk, sigur Høgni Hoydal.

Av øðrum aktivitetum fyri framman eru framhaldandi kanning um hví føroyingar ikki flyta heim aftur, og so stendur eisini stóra veðurlagsfundurin í Keypmannahavn í desember á skránni.

- Vit vilja fegin varpa størri ljós á júst veðurlagsfundin, og har fer tíðin longu so smátt at renna undan, sigur Høgni Hoydal.

Eisini samstarv um nevndarsessir heldur fram sum higartil, og málið hjá formanni Tjóðveldis er framvegis hitt sama.

- Eg vóni sjálvandi, at allir føroyskir og grønlendskir fólkatingslimir eisini gerast limir í Norðuratlantsbólkinum, men til tað hendir halda vit fram í samstarvinum við IA, sigur Høgni Hoydal, fólkatingslimur.

# Nógv fólk á Oyggjarmúla

**Heili 20 kvinnur og menn høvdu meldað til renningina á ovastevnu, sum mátti útsetast til sunnudagin vegna ódnarveðrið leygardagin**

RENNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sera vánaliga veðrið leygardagin forðaði fyri so at siga øllum tiltøkum á ovastevnu, teirra millum eisini renningini niðan á Oyggjarmúla.

Sunnudagin var veðrið tó brúkiligt aftur, so fyrireikararnir skipaðu renningina tann dagin í staðin fyri.

Og sigast má, at áhugin fyri kappingini var stórur, tí 13 menn og sjey kvinnur bjóðaðu av. Eisini tíðirnar vóru sera góðar, tann besta var heilt niðri á átta og einum hálvum minutti.

Eisini høvdu fleiri børn meldað til, men har kom klutur í raðfylgjuna og tíðirnar, so bert tey trý fremstu hjá ávikavist gentum og dreingjum eru listað.

**Tíðirnar hjá monnunum:**
Ámundur Nolsø 8.27,20
Frank Müller 8.39,87
Jógvan Thomsen 8.44,97
Hjørtur Jacobsen 8.57,13
Hanus Pál Thomsen 9.55,77
Jógvan Djurhuus 9.59,66
Fríðálvur Müller 10.06,61
Jón Müller 10.16,52
Leivur í Geil 11.44,63
Baldur Meitil 12.26,18
Hergeir Carstenson 14.34,60
Bent Carstenson 16.13,28
Hans Jákup Davidsen 16.57,48

**Kvinnur:**
Sonja Falck 11.05,23
Anna Malan Thomsen 12.26,83
Joan Sørinardóttir 13.14,00
Katrina í Geil 13.57,53
Fríðun Hansen 16.22,88
Sigvør Lamhauge 16.39,55
Torfríð Johannesen 17.19,23

**Trý tey fremstu í barnarenningini vóru:**
Gentur:
Emma Joensen
Sólja Poulsen
Beinta Hansen

Dreingir:
Teitur Bjarnason
Rógvi Johansen
Teitur Poulsen



*Nakrir av luttakarunum rinda møðina eftir strævna túrin upp á Oyggjarmúla*

*Mynd: Karlot Hergeirsson*

**Stjóri til Sernámsdepilin**

Mentamálaráðið søkir eftir stjóra til Sernámsdepilin, sí www.snd.fo.
Umsóknarfreistin er **fríggjadagin 4. september 2009 kl. 15.00.**
Sí starvslýsing á heimsíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum leys størv).

Mentamálaráðið